er um í slíkum førum, so eru tey í fyrsta lagi noydd at vinna so nógv av íløguni inn aftur so skjótt sum gjørligt. At framtíðar inntøkur eru minni verdar enn inntøkur her og nú, ger, at oljufeløgini hava eitt insitament afturat at taka oljuna upp so skjótt sum gjørligt. Hetta ger, at føroyski landskassin í nøkur ár fær milliardir í eykainntøkum. Um ikki rætt verður atborið, so verður tað til stóran skaða fyri føroyska búskapin um hesin peningurin verður brúktur og settur í umfar í føroyska samfelagnum. Verður peningurin brúktur, so kann hetta lættliga seta gongd á eina stóra inflatión, sum førir til stóran lønarvøkstur, sum við tíðini kann gera føroyska vinnulívið ókappingarført. Tá so oljan einaferð er uppi, hava vit einki vinnulív, sum kann uppihalda føroyska samfelagnum.

Skal oljan hava nakra positiva ávirkan fyri Føroyar, er tað sostatt alneyðugt at oljupengarnir verða beindir í ein grunn, so teir ikki trýsta kostnaðarstøðið uppeftir. Ein kann við tíðini taka nakað út av peninginum, til dømis árliga realavkastið uttan at hetta ger alt ov stóran skaða á føroyska samfelagið.

**Føroyar verða ikki nakað Kuwait**

Um vit koyra 17 milliardir í ein grunn, hvussu nógv hava so 17 milliardir at týða fyri føroyska búskapin ? Um vit rokna við einum realavkasti uppá 3 prosent, so gevur hetta eina inntøku uppá 510 milliónir árliga.

Roknar ein hinvegin uppá persón, so svara 17 milliardir til eina ogn hjá hvørjum føroyingi uppá 370.000 kr. Vit verða sostatt ikki millióningar av at finna 600 milliónir føt av olju. Eitt realavkast uppá 3 prosent av 370.000 gevur eina árliga eykainntøku uppá 11.000 til hvønn føroying. Talið tykist sera lítið, men hinvegin skal ein hava í huga, at tá er inntøkan býtt út á hvønn nýføðing og hvønn pensiónist. Av tí at bert umleið 24.000 av samlaða íbúgvatalinum uppá 46.000 verða roknað uppí arbeiðsstyrkina (tey, ið kunnu og ynskja at arbeiða) so munar ein upphædd uppá 11.000 munandi meira enn tað kanska tykist í fyrsta umfari.

Niðurstøðan er, at vit ikki skulu rokna við nakrari stórari eykainntøku frá oljuni, men at vit hinvegin fáa eitt ískoyti, sum liggur um 45.000 fyri eina familju við tveimum børnum.

**Ríkisveitingin verður minkað burtur**

Verða vit ríkari, um vit finna olju? Tað veldst, hvørjar fyritreytir ein annars setir. Tá Poul Schluter gjørdi avtalu við føroyingar fyrst í 90 árunum, um at ríkisveitingin skuldi minkast í mun til oljuinntøkurnar hjá Føroyum, visti hann hvat hann gjørdi. Um ríkisveitingin er 1250 mió. kr. og veksur við prístalinum, so hevur hon eitt samlað kapitaliserað virði uppá 31,3 mia. kr. Hetta er tó neyvan eitt realistiskt alternativ. Hvørki føroyingar ella danir hava áhuga í, at ríkisveitingin verður hildin á einum so høgum støði. Roknar ein hinvegin við einari ríkisveiting uppá 1250 mió., har upphæddin ikki veksur við prístalinum, so hevur ríkisveitingin eitt virði uppá 20,8 mia. kr. Hetta er kanska eitt meira realistiskt alternativ. Í løtuni sær tað út til, at ríkisveitingin verður 900 mió. kr. (heildarveiting 650 mió. og danskar útreiðslur fyri 250 mió. kr.). Verður henda upphædd hækkað við prístalinum hevur hon eitt kapitaliserað virði uppá 22,5 mia. Í báðum førum hevur ríkisveitingin eitt kapitaliserað virði uppá stívliga 20 mia. kr.

Um føroyingar finna olju, so verða tað sostatt danir sum fáa allan fíggjarliga vinningin av hesum. Teir kunnu spara ríkisveitingina burtur eftir stuttari tíð, uttan at livistøðið broytist stórvegis í Føroyum. Harvið fáa teir ein vinning uppá umleið 20 mia. í spardum útreiðslum.

Føroyingar fáa sostatt ongan fíggjarligan vinning um vit finna olju. Hinvegin fáa vit eina inntøkukeldu afturat, og enntá eina inntøkukeldu, sum ikki fylgir útsvingunum í fiskivinnuni. Harvið fáa vit munandi størri fíggjarligt sjálvbjargni.

Tað skal ikki lítisvirðast. Uttan mun til um fólk annars ganga inn fyri fullveldi ella ikki, eiga vit at stremba ímóti at gera Føroyar meira búskaparliga sjálvbjargnar.

Fleiri av teimum, sum hava tikið lut í orðaskiftinum í seinastuni hava ivast í, um ein møgulig oljuvinna yvirhøvur verður til gagns fyri Føroyar og um føroyingar yvirhøvur eiga at ynskja sær, at olja er í føroysku undirgrundini.

Undirritaði heldur tó, at við omanfyrinevndu fyritreytum, og við tí fyritreyt at føroyskir politikarar halda fingrarnar langt burtur frá oljupengunum, so eru útlit til, at ein møgulig oljuvinna kann vera til stórt gagn fyri land okkara.

**Avleitt virksemi**

Undirritaði hevur einki gjørt við at meta um møguligt avleitt virksemi av oljuvinnuni. Onnur orsøkin er, at tað er sera torført at meta um, hvussu stórt eitt tílíkt virksemi kundi verið, m. a. í hvussu stóran mun føroyingar kunnu gera seg galdandi í avleiddu vinnunum. Hin orsøkin er, at tað verður torført at fáa varandi virðir burtur úr avleidda virkseminum. Sjálvt um føroyingar skuldu klára seg væl í avleiddu vinnunum, hevði tað verið sera torført at nýtt upparbeidda serkunnleikan í øðrum londum, serliga tí oljuvinnan er í minking í hinum europeisku oljulondunum. Sum tað sæst í talvuni (Prógvaðar oljugoymslur), hava hvørki Danmark, Noreg ella Bretland langa tíð eftir sum oljulond. Samanumtikið má sigast, at tað er sera torført at gera metingar um, hvussu stórt avleitt virksemi vit skulu rokna við, og um tað kann fáa positiva ávirkan á føroyska samfelagið í longdini.

Δ

**Prógvaðar oljugoymslur og eftirverandi framleiðsluár**

| | Goymslur mia. føt | Eftirverandi framleiðsluár |
|---|---|---|
| **Danmark** | 1,1 | 7,9 |
| **Italia** | 0,6 | 19,4 |
| **Noreg** | 9,4 | 7,7 |
| **Rumenia** | 1,4 | 31,0 |
| **Bretland** | 5,0 | 5,3 |
| **Onnur Europeisk lond** | 1,6 | 13,9 |
| **Europa tilsamans** | 19,1 | 7,7 |

Prógvaðar goymslur við ársenda 2000.
Eftirverandi framleiðsluár: Roknað við verandi framleiðslu.
Kelda: BPAmoco, Statistical Review

**Virðið av oljuni fyri landskassan.**

| | |
|---|---|
| **Virðið av oljuni, meðan hon er í undirgrundini:** 600 mió. føt ferðir 21 \$ pr. fat ferðir 8 kr. pr. \$ = | 100,8 mia. kr. |
| **Kostnaður av at taka olju upp:** 600 mió. føt ferðir 10,5\$ pr. fat ferðir 8 kr. pr. \$ = | 50,4 mia. kr. |
| **Virðið fyri oljufeløg, brutto:** | 50,4 mia. kr. |
| **Virðið fyri landskassan, skattur 33 %:** | 16,6 mia. kr. |



*Føroyskt strandfaraskip uppdagaði fyrsta stóra bretska oljufundið við markið fyrst í 90-unum*
*Mynd Tommy Djurhuus*






# Handverkarar

Søkt verður eftir dugnaligum handverkarum at arbeiða innan HVS og smiðjuyrkið.

Ring á tlf. 211071

demich
**Stiðjagøta 2 - Postboks 378**
FO-110 Tórshavn
Telefon +298 31 10 71
Telefax +298 31 04 60
e-mail: demich@demich.fo

**Norðoya Javnaðarfelag**

**1. uppstillingarfundur til løgtingsvalið**

verður

**í hølum Klaksvíkar Húsmøðrafelags í Bøgøtu týskvøldið 6. november kl. 19.30.**

**Nevndin**

# Maskinmeistari

**Til M.TR. Hvilvtenni verður hervið søkt eftir maskinmeistara.**

Skipið er mannað soleiðis:
Maskinstjóri
1. meistari
2. meistari

Møguligum áhugaðum kunnu vit bjóða starv sum 1. meistari og 2. meistari. Túralongdin er uml. 2–3 mánaðir umborð og uml. 2–3 mánaðir heima. Nýggjur túrur byrjar uml. 20. nov.

Áhugaðir kunnu ringja

**P/F Hvilvtenni**
tlf. 443380 ella 211380

# Háskúlaskeiðið

frá 7. januar til síðst í juni **2002**

fjølbroytt undirvísing og mennandi upplivingar

**Føroya Fólkaháskúli**

Set teg í samband við okkum um gjøllari upplýsingar

Háskúlavegur 14 - 100 Tórshavn - tlf. 31 17 43
fax. 31 96 87 - Teldupostur: ffh@skulin.fo
Heimasíða: www.skulin.fo/ffh

# Stórur brúktbilamarknaður

**10.000 kr. av hvørjum bili - restina av hesari vikuni!**

| Bilur | Prísur |
|---|---|
| **Mazda 323 F 1,8i GLX** Grønur, 5 hurðar, 5 gear, Km. 35.000, árg. 11/98 | 119.000,- |
| **Mazda 323 S 1,5i LX** Bláur, 4 hurðar, 5 gear, Km. 39.000, árg. 06/97 | 97.000,- |
| **Mazda 323 F 1,5i GLX** Reyður, 5 hurðar, 5 gear, Km. 8.000, árg. 08/00 | 148.000,- |
| **Mazda 323 F 1,5i GLX** Gráur, 5 hurðar, 5 gear, Km. 7.000, árg. 03/00 | 134.000,- |
| **Mazda 323 S 1,5i LX** Reyður, 4 hurðar, 5 gear, Km. 68.000, árg. 05/97 | 90.000,- |
| **Mazda 323 S 2,0 Diesel LX** Bláur, 4 hurðar, 5 gear, Km. 112.000, árg. 06/98 (Sýnaður 12/00) | 120.000,- |
| **Mazda 323 S 2,0 Diesel LX** Gráur, 4 hurðar, 5 gear, Km. 74.000, árg. 06/98 | 125.000,- |
| **Mazda 323 S 2,0 Diesel LX** Bláur, 4 hurðar, 5 gear, Km. 108.000, árg. 02/98 | 118.000,- |
| **Mazda 323 S 2,0 Diesel LX** Reyður, 4 hurðar, 5 gear, Km. 113.000, árg. 06/98 | 115.000,- |
| **Mazda 626 HB 2,0i GLX** Reyður, 5 hurðar, 5 gear, Km. 197.000, árg. 11/87 (Sýnaður 04/01) | 38.000,- |
| **Mazda 929 S 2,2i GLX** Bláur, 4 hurðar, 5 gear, Km. 145.000, árg. 03/89 (Sýnaður 05/01) | 45.000,- |
| **Ford Sierra** Gráur, 5 hurðar, 5 gear, Km. 98.000, árg. 10/93 (Sýnaður 07/00) | 47.000,- |
| **Toyota Corolla 1,6 Luna** Reyður, 5 hurðar, 5 gear, Km. 38.000, árg. 04/98 | 122.000,- |
| **Toyota Carina Sedan 1,8 CDX** Grønur, 4 hurðar, 5 gear, Km. 44.000, árg. 10/97 | 128.000,- |
| **Renault Megane 1,4e** Grønur, 5 hurðar, 5 gear, Km. 34.000, árg. 08/98 | 110.000,- |
| **Ford Mondeo** Reyður, 4 hurðar, 5 gear, Km. 80.000, árg. 01/95 (Sýnaður 01/00) | 85.000,- |
| **Toyota Carina St.car** Hvítur, 5 hurðar, 5 gear, Km. 61.000, árg. 06/91 (Sýnaður 01/01) | 58.000,- |
| **Ford Escort 1,8 Diesel St.car** Gráur, 5 hurðar, 5 gear, Km. 85.000, árg. 05/96 (Sýnaður 05/01) | 98.000,- |
| **Ford Escort 1,8 Turbo Diesel St.car** Reyður, 5 hurðar, 5 gear, Km. 44.000, árg. 08/97 (Sýnaður 02/00) | 130.000,- |
| **Renault Megane 1,4e** Grønur, 5 hurðar, 5 gear, Km. 58.000, árg. 04/97 | 120.000,- |
| **Renault Megane 1,6e Sedan** Beige, 4 hurðar, 5 gear, Km. 35.000, árg. 06/98 | 120.000,- |
| **Renault Twingo** Reyður, 3 hurðar, 5 gear, Km. 48.000, árg. 04/99 | 84.000,- |
| **Honda Accord 2,0i Vtec** Grønur, 4 hurðar, 5 gear, Km. 44.000, árg. 11/99 | 185.000,- |
| **Peugeot 106 Diesel** Bláur, 3 hurðar, 5 gear, Km. 88.000, árg. 11/95 | 66.000,- |
| **Renault Megane 1,6e** Reyður, 5 hurðar, 5 gear, Km. 60.000, árg. 12/96 (Sýnaður 09/00) | 100.000,- |
| **Renault Megane 1,4e** Reyður, 5 hurðar, 5 gear, Km. 35.000, árg. 08/98 | 115.000,- |
| **Toyota Carina Sedan DX** Gráur, 4 hurðar, 5 gear, Km. 246.000, árg. 02/87 (Sýnaður 10/01) | 15.000,- |
| **Ford Escort Tuscany Turbo Diesel** Hvítur, 5 hurðar, 5 gear, Km. 112.000, árg. 05/97 | 88.000,- |
| **Ford Escort St.car 1,6 Zetec** Grønur, 5 hurðar, 5 gear, Km. 33.000, árg. 06/98 | 124.000,- |
| **Fiat Tempra S.W.1,6i.e. St.car** Gráur, 5 hurðar, 5 gear, Km. 68.000, árg. 07/95 (Sýnaður 09/00) | 68.000,- |
| **Renault Twingo** Grønur, 3 hurðar, 5 gear, Km. 76.000, árg. 11/95 (Sýnaður 09/00) | 45.000,- |
| **Ford Courier 1,8 Diesel** Reyður, 4 hurðar, 5 gear, Km. 95.000, árg. 92 | 35.000,- |

**Opið er leygardagin**

BERG MOTORS

BERG MOTORS

BERG MOTORS VØRUVOGNAR VØRUVOGNAR VØRUVOGNAR
Staravegur 1-3 • Tel. 31 35 35 • Fax 31 77 35

**BERG MOTORS**
Staravegur 1-3 • Tel. 31 35 35 • Fax 31 77 35